# Uppskrift uppá eina góða loggbók

## 1. Byrja altíð við dagfesting og tíð

- Hósdagur, 30.10.2024, kl. 10.00

## 2. Mál fyri dagin

- **Setið orð á, hvat/hvørji mál tit hava** fyri dagsins arbeið. Tað kann gott vera okkurt einfalt, sum til dømis; vit skulu finna kunning um X, ella, vit skulu minnast til at kanna X. Skriva eisini niður, hvat júst tú hevur ábyrgd av at fáa gjørt.
- **Tað er týdningarmikið** at skriva málið/málini niður, tí tað hjálpir tykkum at halda fokus á dagsins uppgávum.
- *Dømi*: "í dag skulu vit finna og samanbera tríggjar keldur/greinar um veðurlagsbroytingar. Eg skal leita inni á www.123.fo, meðan hini leita inni á bókasavninum”

## 3. Arbeiðsgongdin

- **Greið frá, hvat tú hevur gjørt** í dag: skriva stutt og greitt um tær uppgávur, tú hevur gjørt, og hvørjar uppgávur tit hava gjørt í felag.
- **Háttalag/hættir:** Um tú hevur leitað á internetinum, gjørt viðtali/interview, tikið film upp, og/ella annað.
- *Dømi:* “Eg havi leitað í internetinum, og eg fann tríggjar greinar um veðurlagsbroytingar frá álítandi keldum. Eg havi eisini samanborið tær, og skrivað niður munirnar í greinunum.”

## 4. Samstarvið í bólkinum

- **Uppgávu-deiling:** Greið frá, hvør í bólkinum gjørdi hvat, og hvussu uppgávurnar blivu deildar.
- **Samskifti:** Viðmerk, hvussu samskiftið hevur gingið í dag. Hvussu var huglagið tykkara millum? Vóru tit ósamd(ar/ir) í nøkrum, hvussu loystu tit ósemjuna? Bleiv hon loyst?

- **Stuðul og hugskot:** Greið frá, hvussu tit hjálptu hvørjum øðrum, ella komu við hugskotum til, hvussu hin kundi loysa sína uppgávu.
- *Dømi*: "Vit blivu samdar í, at eg skuldi leita eftir meira vitan, meðan Natalia og Mariann skuldu byrja at gera spurningar til viðtalið. Men vit blivu eitt sindur ósamdar, tí Mariann vildi byrja uppá power-pointið beinanvegin. Men vit prátaðu síðani um tað, og so blivu vit samdar í, at best er at blíva lidnar við tað vit gera nú, og goyma pp til síðst."

## 5. Avbjóðingar og loysnir

- **Skriva avbjóðingarnar niður:** Hvat var trupult? Hevði tú nakrar avbjóðingar?
- **Reflektera um loysnir:** hvussu loysti tú avbjóðingina/trupulleikan? Um tú ikki hevur loyst tað, hvussu fært tú so arbeitt víðari, fyri at finna eina loysn?
- *Dømi*: "Tað var ringt at finna keldur/greinar, tí tær vóru allar rættiliga truplar at skilja. Eg spurdi læraran um hjálp, og hann vísti mær á onkra heimasíður, ið eru betur/lættari at brúka.

## 6. Úrslit og niðurstøður

- **Greið frá, hvat tú hevur lært** ella fingið burturúr í dag. Tað kunnu vera smá framstig ella stórar niðurstøður.
- *Dømi*: "í dag lærdi eg, hvussu veðurlagsbroytingar ávirka bæði djór og plantur, og eg fann nýggja vitan, sum eg kann brúka í míni uppgávu

## 7. Ætlan til í morgin

- **Skriva eina stutta ætlan**, um hvat tú skalt gera í morgin. Hetta ger tað lættari fyri teg at koma í gongd næstu ferð tú letur tína loggbók upp.
- *Dømi*: "Næstu ferð fari eg at gjøgnumganga tær tríggjar greinarnar, og gera eitt yvirlit av teimum týdningarmiklastu punktunum."

---

## Tips til loggbókina

- **Skriva stutt og presis** – loggbókin er ikki ein stílur.
- **Ver erlig(ur)** – skriva um tað gongur væl, men skriva eisini um tað gongur illa.
- **Brúka stikkorð** – stikkorð kunnu gera tað lættari at skriva, og at fáa yvirlit
- **Tíð skal setast av hvønn dag** – ger tað til ein vana at skriva loggbók hvønn dag, tú arbeiðir við uppgávuni

---

## Dømi uppá eina loggbók

| | |
|---|---|
| Dagfesting | Mikudagur 30/10/2024 kl. 10.00 |
| Mál fyri dagin | Finna keldur um evnið |
| Arbeiðsgongd | Leita á netinum og bókasavninum |
| Samstarv | Gingið okay væl, men Randi gjørdi ikki so nógv, og tað helt eg vera irriterandi |
| Avbjóðingar og loysnir | Eg fari at tosa við hana um tað í morgin. Um tað ikki riggar, so má eg snakka við flokslæraran |
| Úrslit og niðurstøður | Lærdi nógv nýtt um evnið hjá okkum, og fann útav, at vit kunnu ikki taka alt við |
| Ætlan til í morgin | Skriva tey viktigastu høvuðspunktini niður, og vita um vit fáa pláss til tað, vit vilja hava við |